LM-060/2022

Dátueftirlitið

Fíggjarmálaráðið
Postbox 2039,
Tinganes
110 Tórshavn
fmr@fmr.fo

Tórshavn, tann 10. februar 2023
J.nr: 23/01619-3
Tykkara skriv:
Málsviðgeri: TH/ST

Viðvíkjandi uppskoti til løgtingslóg um almenna talgilda postskipan

Fíggjarmálaráðið hevur sent Dátueftirlitinum uppskot til løgtingslóg um Mínboks til ummælis.

Dátueftirlitið hevur hesar viðmerkingar:

Viðvíkjandi § 3

Dáturáðið hevur á fundi tann 11. februar 2021 umrøtt teldupostsamskifti, og hvussu dátuábyrgdarar o.o. kunnu tryggja, at trygdin er nøktandi, tá persónupplýsingar verða sendar umvegis teldupost. Niðurstøðan hjá Dáturáðnum var, at tann, sum sendir persónupplýsingar umvegis teldupost, eigur at tryggja sær, at teldupostsamskiftið er bronglað. Verða viðkvæmar persónupplýsingar og persónupplýsingar, sum eru fevndir av trúnaðarásetingum, sendar við telduposti, eigur sendarin at vera serliga varin.

Dáturáðið var samt um, at tað til eina og hvørja tíð er upp til tann einstaka dátuábyrgdaran at meta um, hvørji trygdartiltøk eru hóskandi at seta í verk, og at meta um, m.a. hvat slag av brongling skal nýtast.

Dáturáðið var tó samt um, at TLS-brongling (versión 1.2.) ella annað slag av brongling, sum er á sama støði, er eitt lágmark fyri trygd, tá ið viðkvæmar persónupplýsingar verða sendar umvegis teldupost.

Í § 4 í dátuverndarlógini[1] er ásett, at ásetingar í aðrari lóggávu, ið geva tí skrásetta eina betri rættarstøðu, ganga fram um ásetingarnar í hesi løgtingslóg. Dátueftirlitið metir, at ásetingin í § 3 tryggjar eitt *hægri* verndarstøði enn lágmarkið ið Dátueftirlitið hevur ásett, og tí ikki er í stríð við ásetingina í § 4 í dátuverndarlógini.

Dátueftirlitið tekur tí undir við, at MínBoks verður nýtt tá almennir stovnar senda viðkvæmarpersónupplýsingar og trúnaðarupplýsingar.

Viðvíkjandi § 4 - Aldursmarkið lækkast til 13 ár

Dátueftirlitið mælir til, at aldurmarkið fyri at tekna Mínboks verður broytt til 13 ár, ið er sama aldursmarkið sum er galdandi fyri Samleikan. Við at broyta aldursmarkið, kunnu tey sum eru 13 ella 14 ár eisini hava møguleikan at móttaka viðkvæmar persónupplýsingar og trúnaðarupplýsingar umvegis Mínboks.

Viðvíkjandi § 4 - Samtykki sum viðgerðargrundarlag

Sambært §4 er tilmeldingin til MínBoks sjálvboðin, og í viðmerkingunum til løgtingslógaruppskotið verður upplýst, at viðgeraðargrundarlagið er samtykki.

[1] Løgtingslóg nr. 80 frá 7. juni 2020 um vernd av persónupplýsingum

Dátueftirlitið

Dátueftirlitið skal í tí sambandi vísa á, at dátuverndarlógin setur ávísar treytir fyri at nýta samtykki sum viðgerðargrundarlag. Millum annað er í § 9, stk. 3 ásett, at tað gjørligt skal vera, at taka samtykkið aftur. Ítøkiliga vil tað siga, at øll viðgerð aftaná at samtykkið er tikið aftur í útgangsstøðinum má steðga. Er viðgerðin tann, at upplýsingar hjá tí skrásetta verða goymdar, so eiga hesar upplýsingar at verða strikaðar um tann skrásetti tekur sítt samtykki aftur. Er hetta ikki gjørligt, kann samtykkið ikki nýtast sum viðgerðargrundarlag.

Tað eru aðrar viðgerðarheimildir enn samtykki. Tað ber sostatt til at viðgera persónupplýsingar, sjálvt um tann, sum upplýsingarnar eru um, ikki hevur givið samtykki. Tað er tá umráðandi at tryggja sær, at onnur heimild er fyri viðgerðini. Um tað er ásett í lóg, at viðkvæmar persónupplýsingar kunnu viðgerast, kann hetta verða grundarlagi undir viðgerðini.

Viðv. § 6

Í § 16, stk. 1 nr. 1 í dátuverndarlógini er ásett, at privat kunnu viðgera upplýsingar um persónstalið, tá ið viðgerðin er heimilað í lóg. Dátueftirlitið metir, at ásetingin í § 6 í løgtingslógaruppskotinum er nøktandi í so máta. Dátueftirlitið tekur undir við, at áðrenn ein privatur løgfrøðiligur persónur kann verða umfataður av § 6, stk. 1, so skal viðkomandi útflýggja landsstýrismanninum uttanhýsis KT grannskoðanarváttan, ið kann veita fullgóða trygd fyri, at hóskandi tøknilig og bygnaðarlig tiltøk eru sett í verk fyri at tryggja, at óviðkomandi ikki fáa kunnleika til persónstalið, misbrúka tað ella annars ólógliga viðgera tað.

Dátuábyrgdari og dátuviðgeri

Í lógaruppskotinum er ikki ásett, hvør er dátuábyrgdari, og hvør er dátuviðgeri av talgilda postinum.

Sambært § 6, stk. 1, nr. 6 í dátuverndarlógini er ein dátuábyrgdari ein likamligur ella løgfrøðiligur persónur, ein almennur myndugleiki, ein stovnur ella ein onnur eind, sum eina ella saman við øðrum ger av, til hvørji endamál og við hvørjum hjálpitólum persónupplýsingar kunnu viðgerast.

Av tí, at tað við hesum løgtingslógaruppskotið ikki longur verður einstaki almenni myndugleikin ið ger av hvørji hjálpartól skulu nýtast, kann ivi taka seg upp um hvør er dátuviðgeri og hvør er dátuábyrgdari. Dátueftirlitið mælir tí til eina áseting sum greitt tilskilar, at Gjaldstovan/Talgildu Føroyar er dátuábyrgdari fyri skipanina sjálva – tað vil siga, viðgerðina av teimum persónupplýsingum, ið eru neyðugar fyri at reka skipanina, og at stovnar og fyritøkur, ið nýta skipanina, eru dátuábyrgdarir fyri innihaldið ið verður sent umvegis MínBoks. Gjaldstovan/Talgildu Føroyar er tá dátuviðgerði.

Viðurskiftini í millum dátuábyrgdaran og dátuviðgerðan eru løgskipaði í § 41 í dátuverndarlógini. Millum annað verður ásett, at viðgerðin hjá einum dátuviðgera skal vera grundað á avtalu, sum er bindandi, og sum m.a. ásetir evnið fyri viðgerðini, endamál, eins og skyldur og rættindi hjá dátuábyrgdaranum. Í viðmerkingunum til ásetingina er tó skrivað, at viðgerðin fer fram sambært bindandi avtalu ella *øðrum rættarligum skjali*. Dátueftirlitið tulkar tí ásetingina á tann hátt, at eitt annað rættarligt skjal enn ein avtala kann verða nýtt, um skjalið lýkur innihaldssligu krøvini til eina dátuviðgerðaravtalu og er bindandi. Eitt viðkomandi dømi er ein kunngerð.

Tað eigur tí at verða umhugsað, at umframt at áseta, hvør er dátuábyrgdari og dátuviðgerði, so eisini at áseta at landsstýrismanninum verður heimilað at áseta nærri reglur um ábyrgd, uppgávur og eftirlit í sambandi við, at Gjaldstovan/Talgildu Føroyar viðgera persónupplýsingar vegna teir ymsu dátuábyrgdarnar

Dátueftirlitið

ið brúka MínBoks-skipanin. (Sí eitt nú § 2a í lov om Digital Post[2] og kunngerðina[3] ið er givin við heimild í § 2a, stk. 5).

Ein borgari, ið brúkar MínBoks, er hinvegin fevndur av undantakinum í § 3, stk. 1 í dátuverndarlógini, og viðkomandi verður tí ikki dátuábyrgdari fyri tær upplýsingar um triðjamann, ið viðkomandi goymir í síni MínBoks.

Vegna Dátueftirlitið

Tóri Højgaard
stjóri

[2] Lovbekendtgørelse nr. 686 af 15. april 2021 af lov om Digital Post fra offentlige afsendere
[3] Bekendtgørelse nr. 2020 af 29. okt. 2021 Bekendtgørelse om ansvar, opgaver og tilsyn i forbindelse med behandlingen af personoplysninger indeholdt i meddelelser og opbevaringen heraf i juridiske enheders digitale postkasse